

## ES roknaði skeivt

Fyri tveimum mánaðum síðani segði ES-nevndin, at hon ætlaði sær at skerja fiskidagarnar hjá teimum donsku fiskimonnunum ein lítlan triðing. Boðini fingu øði í donsku fiskivinnuna, og talsmenn hjá vinnuni søgdu, at ein so stór skerjing fór at taka beinini undan fiskivinnuni. Tað vísti seg kortini, at ætlanin hjá ES-nevndini bygdi á skeivar upplýsingar, og síðani hava politikararnir og vinnan roynt at finna ein annan leist. Í morgun boðaði danska matvørumálaráðið so frá, at ein semja er fingin, sum tryggjar teimum donsku fiskimonnunum sínar fiskidagar.

# Vaðhorn Seafood er ein

**Í 2003 varð saltfiskavirkið á Hulki kosið ársins virki. Hetta hava virkisleiðsla og arbeiðsfólk eftir øllum at døma tikið til sín. Seinastu 4-5 árini er talið av arbeiðsfólki umleið tvífaldað, og í ár hevur virkið tikið í nýtslu ein tilbygning, sum ger umstøðurnar uppaftur betri. Seinastu árini eru skúlanæmingar lærdir upp á virkinum, og í dag eru hesir ein partur av grundarlagnum, tá á stendur, og nógv skal fáast frá hondini**



*Vaðhorn Seafood framleiðir saltfiskavørur úr toski, longu og brosmu*

VAÐHORN SEAFOOD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er vorðið eitt sindur langt ímllum, at tú hoyrir um vinnuligar sólskinssøgur. Hugsanin millum fólk, tá tíðir broytast, og tað gongur niður á bakka í búskapinum, er ivaleyst, at meira ella minni alt gongur illa samstundis.

Men soleiðis er tað bara ikki – og tíbetur, kunnu vit siga.

Sum skrivandi tíðindamaður kemur tú ongantíð runt, men ofta detta tankarnir á, hvussu gangast man ymsastaðni kring um í vinnuni.

Tað eru vinnulívsfólk, sum ofta lata hoyra frá sær, men tað eru eisini tey, sum gera lítið um seg og stríðast í tí stilla.

## Gongur ymiskt

Í morgun møtti tú manni, sum er í starvi á saltfiskavirkinum hjá Faroe Seafood á Toftum. Hann læt illa at. Lítil fiskur og lítið arbeiði. Fáir tímar til tey, sum nú einaferð hava valt at byggja sítt grundarlag á tað, sum arbeiði á virkinum kann geva.

Men, tá lítið virksemi er á saltfiskavirkinum hjá Faroe Seafood á Toftum – hvussu man so gongdin vera á øðrum virkjum, ið virka saltfisk? spyrt tú teg sjálvan.

Eitt annað stórt saltfiskavirki er Fiskavirkið í Gøtu, og kennur tú onkran, sum arbeiðir har, hevur tú varhugan av, at har er sum heild væl at virksemi, tíbetur.

Men á vesturarminum á Skálafjørðinum liggur enn eitt saltfiskavirki, sum eisini hevur røtur nokso nógv ár afturi í tíðini. Tað er Vaðhorn Seafood, sum seinastu nógvu árini hevur húsast á virkinum, sum í sínari tíð varð bygt til virksemi úr tara – ella áður rópt alginatvirkið.

## Ein sólskinssøga

Í morgun valdi eg so at "plága" Vaðhorn Seafood eitt sindur, og tað er ikki sørt, at vit her hoyrdu eina sólskinssøgu.

Stjóri á virkinum er Jógvan Gregersen, virkisleiðari er Jens Martin Knudsen, sum vit best kenna úr landsliðsmálinum – og umsitingarleiðari er Jens Kristian Rasmussen.

Jógvan var júst í holt við at keypa fisk á uppboðssølu og var tí ikki tøkur, tá vit fregnaðust.

Í 2003 varð Vaðhorn Seafood kosið at vera ársins virki, og nógv bendir á, at tey, sum standa aftanfyri raksturin og fólkið, sum knoklar við borðini og á gólvinum, rættiliga hava kýtt seg fyri at liva upp til hendan heiður, ið virkið fekk fyri seks árum síðan.

Jens Kristian Rasmussen sigur, at tá hann byrjaði á virkinum fyri 4-5 árum síðan, vóru sløk 40 tímalønt á lønarlista umframt tey, sum fingu fasta løn.

Í dag er talið av tímaløntum út við tvífaldað, og umsitingarleiðarin, sum eisini avgreiðir lønir, metir, at eini 90 fólk gjøgnum ein mánaða eru á lønarlista hjá Vaðhorn Seafood.

- Vit hava havt rættiliga støðugt arbeiði tað mesta av hesum árinum, og vit hava eisini arbeitt í vaktum, tá mest hevur verið at gera. Umframt tey, sum arbeiða fast her hjá okkum, hava vit eisini skúlanæmingar úr økinum, sum regluliga